Sumba-B71 2-0 (1-0):

Sumbingar halda møguleikanum

Vindurin setti sín dám á dystin á Krossinum, men fyri sumbingar vóru stigini tey týdningarmestu

2. DEILD
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Ein dystur varð leiktur í aðru deild sunnudagin, tá Sumba heima á Krossinum tók ímóti B71. Júst hesi bæði feløgini mundu vera millum teirra, sum vórðu havd á munni, tá tosast skuldi um kandidatar til uppflyting, men í ár hevur tað so bert verið Sumba, sum hevur livað upp til hetta heitið.

Og tað var eisini sjón fyri søgn sunnudagin, at tað vóru teir á heimaliðnum, sum vóru betri fyri. Nógvi vindurin gjørdi sítt til, at tað bar illa til at fáa nakað veruligt fótbóltsspæl fram, men serliga í fyrra hálvleiki, tá teir høvdu vindin undan, royndu sumbingar at trýsta mótstøðumenninar.

Og hetta gav eisini úrslit. Vindurin viðførdi ofta, at spælið varð kroyst oman móti sandoyarmálinum, og ta einu ferðina førdi trunkaspælið her við sær, at Karl Lisberg fekk skot á, og so stóoð 1-0.

Seinna umfarið vóru tað sandoyingarnir, sum høvdu vindin undan, men teir megnaðu sjáldan at seta eins stórt trýst á, sum vertirnir høvdu megnað tað. Tó so, onkran møguleika høvdu teir, og ivaleyst iðrar Eli Hentze seg um, at skotið ikki var fáar sentimetrar beinari, tá hann meddaði á stongina.

Og móti dystarenda fall revsingin fyri vantandi úrtøkuna. René Thomsen fekk bóltin eftir innkast, og tá hann smekkaði hart og flatt innfyri málið, var verjuleikari á heimaliðnum somikið óheppin, at hann beindi bóltin í málið, og so var alt avgjørt.

Iðra seg

Við sigrinum syrgdu sumbingar fyri, at teir enn halda fast í silvurstríðnum, har teir í løtuni eru tvey stig frammanfyri TB, sum hinvegin eigur ein dyst til góðar.

Men tað er einki at taka seg aftur, at sumbingar iðra seg um, at tað ikki hevur eydnast at fáa betri úrtøku enn tað sama í fleiri dystum í ár. Serliga á heimavølli hevur gingið striltið at fáa úrtøku burtur úr málmøguleikunum, og eitt nú vóru bæði tvøramenn og fuglfirðingar væl nødgir um, at tað eydnaðist at fáa stig við sær av Krossinum. Stig, sum fyri Sumba kundu ført við sær, at silvurið hevði verið mest sum tryggjað. Fyri ikki at tosa um dystin móti LÍF fyri viku síðani, tá sumbingar tveittu eina tvey mála stóra leiðslu burtur.

Hjá sandoyingum verður tað so ikki í ár, at uppflyting kemur upp á tal. Heldur tvørtur ímóti,tí í verandi støðu kann liðið als ikki kenna seg heilt trygt. LÍF fór við sínum sigri leygardagin upp um sandoyingar, og tó at beinleiðis niðurflyting neyvan kemur upp á tal, so man tað vera lítið hugaligt at spæla fyri lívinum í deildini, tá ætlanin var at spæla um rættin fyri uppflyting.

Dysturin í tølum

Sumba-B71 2-0 (1-0)
1-0: Karl Lisberg
2-0: sjálvmál

LÍF-B68 3-1 (0-1):

LÍF upp um strikuna

2. DEILD
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

B68 hongur framvegis í einum klønum tráði, men hann er ógvuliga klænur. Leygardagin høvdu teir møguleikan at styrkja um vánaliga støðuna, og í 1. hálvleiki sá tað hampuligt út í Leirvík, har vindurin leikaði í og mól.

Við næsta sigrinum á rað slapp LÍF upp á áttanda plássið. Har hava teir einki ímóti at vera, táið átjanda umfarið verður liðugt spælt, men tað er framvegis nógv at stríðast um og fyri.

Ein minutt undan steðginum legði Aksel Højgaard B68 framum. LÍF miðverjan roknaði skeivt, bólturin stakk inn um verjuna, og veteranurin gjørdi einki mistak, táið hann varð einsamallur frammanfyri Allan Joensen, sum kendi seg noyddan at koma út ímóti, og so bakkaði eitt sindur aftur. Aksel lyfti bóltin í bleytum boga, og so var B68 í betra hýrinum í steðginum.

Seinna umfarið var bara tríggjar minuttir gamalt, táið Magnus á Dalbø javnaði til 1–1. Niels Pauli Justinussen, sum var rættuliga væl upplagdur í vinstra borði, legði flatt innfyri, og Magnus skoraði úr brotsteiginum.

Eitt korter restaði, tá ið Niels Pauli Justinussen legði LÍF framum. Úr vinstru sendi hann í handara síðunetið. Spenningurin svann, tá ið Kaj Eli Olsen, sum tá ið tjúgu minuttir vóru eftir hevði avloyst Magnus á Dalbø, í Zuma stíli, sum teir siga í Leirvík, legði seg afturav og sendi framvið Mortani Hansen.

LÍF er sloppið undan allari hóttan av beinleiðis niðurflyting. B68 hevur ein lítlan møguleika at fáa B71 aftur, men alt bendir á, at toftamenn bara fingu eitt ár í næstbestu deildini á hesum sinni.

LÍF skal í síðstu umførunum spæla ímóti B36 í Gundadali, ÍF í Leirvík og í Vági. B68 eigur Sumba og B71 á heimavølli og B36 í Gundadali.

LÍF–B68 3–1 (0–1)

0–1: Aksel Højgaard
1–1: Magnus á Dalbø
2–1: Niels Pauli Justinussen
3–1: Kaj Eli Olsen

AB-B36 1-0 (0-0):

Í evstu løtu

B36 helt leingi, men í seinastu løtu kom Johnny Samuelsen sum ketta úr høvdatrogið og skey málið, sum heldur AB í nær námind heiðursmerkjaplássunum

2. DEILD
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

AB er enn við í stríðnum um at ogna sær heiðursmerki. Hesum syrgdu argjamenn fyri, tá teir á heimavølli fingu øll trý stigini til høldar móti B36.

Og fagnaðurin var stórur. Ikki bara um stigini, men eisini tí hetta var fyrstu ferð í heilt langa tíð, at tað hevur eydnast AB at fáa øll stigini á heimavølli móti B36. Hetta hevur annars verið roynt hesi seinnu árini, meðan AB hevur arbeitt seg upp ígjøgnum deildirnar, men men mest sum hvørja ferð hevur tað tó eydnast árstalsfelagnum at leggja fót fyri hesum.

Og tað var sum so um reppið, at tað eydnaðist aftur hesaferð. Fyrra umfarið leygardagin var tað AB, sum átti meginpartin av spælinum. Bólturin varð koyrdur væl kring vøllin, har mótstøðumenninir høvdu sera trupult við at fáa fatur á honum, men tað var alla tíðina, sum um avgerandi møguleikin – og málið - bíðaði.

Kanska hevði tað gingið ov væl fyri steðgin, soleiðis at ferðin nú varð sett nakað niður, men í øllum førum kom B36 nógv betri við eftir steðgin. Málmøguleikar spurdust burturúr, og eitt nú høvdu Sonni Johansen og Áki Mørk tveir heilt stórar av slagnum, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin framvið Egini Høgnesen, sum nú verjir AB-málið.

Hinvegin átti AB nú eisini onkran møguleika, og eitt nú átti Hans Jørgen Djurhuus at fingið betri nyttu burturúr, tá hann gjørdist blankur stutt úr málinum, men skotið fór beint í krovið á Magnusi Poulsen í B36-málinum.

Líkt var til, at alt skuldi enda, á sama hátt sum tað byrjaði, men so fingu argjamenn loksins orsøk at fegnast. Trunkaspæl var í B36-brotsteiginum, og onkursvegna fekk Johnny Samuelsen skot á. Bólturin smeyg sær millum vinir og figgindar og helt fram eftir jørð heilt úti við stongina, og so hjálpti tað lítið, at málverjin royndi at toyggja seg.

Hetta hendi bert tveir minuttir fyri leiklok, og tá var ov seint hjá mótstøðuni at svara aftur. AB syrgdi við hesum fyri, at teir enn eru við í stríðnum um heiðursmerki. Her er tó enn nakað upp til bronsuna, sum TB eigur í løtuni, og eftirverandi dystarskráin sær alt annað enn løtt út. Men í øllum førum fingu teir nú kensluna av, at javnir dystir eisini kunnu koppa til teirra fyrimun, og so er spurningurin, hvussu nógv sjálvsálit hetta hevur kastað av sær.

Dysturin í tølum

AB-B36 1-0 (0-0)
1-0: Johnny Samuelsen

LÝSINGAR
PLAKATIR
T-SHIRTS
SKILTIR
FLØGG...
-vestan alt grafiskt arbeiði
GRAFIX
TRONGISVÁGUR
22 42 51

Nálir á Svangaskarði

Jóannes Jakobsen var fyrstu nógvu árini liðskipari hjá føroyska liðnum, og hann fekk sjálvandi eisini sína viðurkenning fyri hetta á Svangaskarði

Mynd: Álvur Haraldsen

Í hálvleiksteðginum í dystinum millum Føroyar og Litava seinasta mikudag, var tíðin loksins komin, tá FSF skuldi heiðra leikararnar, sum seinastu nógvu árini hava sett Føroyar á altjóða fótbóltskortið.

Hetta hevur uttan iva verið nakað, sum leikararnir hava ótolnast eftir, og skemtisøgurnar um, tá Jens Martin hevur handað skeiðir og gaflar av døgurðaborðinum eru eisini fleiri í tali.

Nú sleppur aldursforsetin tó undan hesum tátti, tí framyvir verða nálir latnar øllum teimum, sum umboða føroyska landsliðið á tí pallinum, sum eitur Alandsdsdystir hjá monnum. Fyrstu ferð leikari er á liðnum, verður ein bronsunál latin. Silvurnál verður latin teimum, sum røkka 25 dystum og gullnál er so til teir, sum koma upp á hálvthundrað dystir.

Enn er ikki gjørt av, hvørt talan verður um aðrar heiðursgávur, um dystartalið verður enn størri, men ein leikari sum Óli Johannesen fer nú av álvara at nærkast teimum 75, og so er spurningurin, hvørt talan eisini tá verður um nakra gávu.

Óvist við VB-GÍ

Illfýsna veðrið kring landið sunnudagin hevði eisini sína ávirkan á fótbóltin. Longu væl undan dystinum á Toftum stóð greitt, at har var í øllum førum ikki spælandi, og tí fingu liðini bæði boð um, at her gjørdist einki. Ístaðin varð nýggjur dystur ásettur longu mánakvøldið, og ístaðin kundu toftamenn og runavíkingar fara við bili til Eiðis, har teir sóu argasta kappingarneytan seta stig til.

Heldur ikki í Vági eydnaðist at avgreiða dystin millum VB og GÍ. Her varð ein roynd gjørd, men eftir einum korteri stóð greitt, at tað var ikki spælandi, og tí valdi dómarin at floyta dystin av.

Nær hesin dystur verður leiktur, er enn ikki greitt. Sum skilst vóru gøtumenn hugaðir at gera eina nýggja roynd mánadagin, men hetta vildu vágbingar ikki, so í løtuni er ikki greitt, nær nýggjur dystur verður ásettur.

- jm

Støðan, 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	mál	vunnin mál	tapt munur	mál-stig
1 HB	15	9	-	5	-	1	34	15	19	32
2 B36	15	10	-	1	-	4	32	16	16	31
3 B68	14	8	-	5	-	1	20	8	12	29
4 NSÍ	14	8	-	4	-	2	26	11	15	28
5 KÍ	15	7	-	2	-	6	24	22	2	23
6 EB/Streymur	15	5	-	5	-	5	25	29	-4	20
7 GÍ	14	4	-	4	-	6	16	22	-6	16
8 VB	14	3	-	4	-	7	15	24	-9	13
9 FS V	15	2	-	2	-	11	19	38	-19	8
10 Skála	15	1	-	0	-	14	8	34	-26	3

Støðan, 2. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	mál	vunnin mál	tapt munur	mál-stig
1 ÍF	15	11	-	3	-	1	33	12	21	36
2 Sumba	15	8	-	4	-	3	28	13	15	28
3 TB	14	8	-	2	-	4	44	22	22	26
4 AB	15	6	-	5	-	4	26	18	8	23
5 KÍ	15	7	-	1	-	7	31	41	-10	22
6 VB	15	6	-	2	-	7	28	19	9	20
7 B36	14	5	-	3	-	6	22	19	3	18
8 LÍF	15	5	-	1	-	9	20	39	-19	16
9 B71	15	4	-	2	-	9	18	22	-4	14
10 B68	15	2	-	1	-	12	9	54	-45	7

Máltindarnir

1. deild

Hjalgrím Elttør	KÍ	13
John Petersen	B36	9
Heðin á Lakjuni	B36	8
Andrew av Fløtum	HB	8
Helgi L. Petersen	NSÍ	7
Jákup á Borg	B36	6
Rógvi Jacobsen	HB	6
Sonni L. Petersen	NSÍ	6
Birgir Jørgensen	VB	6
Milan Kulic	VB	6
Súni Fríði Johannesen	B68	5
Sorin Anghel	EB/S	5
Krzystof Popczynski	GÍ	5
Karsten From	NSÍ	5
John Heri Dam	B68	4
Egil á Bø	EB/S	4
Hans Pauli Samuelsen	EB/S	4
Ronnie Samuelsen	EB/S	4
Birgir Joensen	FSV	4
Clayton Soares	FSV	4
Kim Poulsen	FSV	4
Símun Samuelsen	GÍ	4
Rúni Nolsøe	HB	4
Tór-Ingar Akselsen	HB	4

2. deild

Kaj Roest	TB	10
Dan Mortensen	TB	9
Áki Mørk	B36	8
Hanus Eliasen	ÍF	8
Eirikur Joensen	Sumba	8
Eyðun Samuelsen	AB	7
Allan Michelsen	TB	7
Pætur Dam Jacobsen	AB	6
Høgni Zachariasen	ÍF	6
Ken Bærendsen	ÍF	6
Helmar Lassen	KÍ	6
Óli Johannesen	TB	6
Sigmundur Mikkelsen	VB	6
Erling Fles	KÍ	5
Olgar Danielsen	KÍ	5
Rasmus Nolsøe	TB	5
Jón Pauli Olsen	VB	5
Axel Højgaard	B68	4
Símun Hansen	B71	4
Tummas Pauli Olsen	B71	4
Magnus Dalbø	LÍF	4
René Thomsen	Sumba	4